**Semja millum Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna**
**og**
**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Sáttmálin fevnir um handverkarar og linjumenn í tænastu hjá SEV

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2010 til 1. oktober 2011 og byggir á ein karm, sum er 1 %.

**1.** 1. oktober 2010 hækkar lønin við 1 %.
**2.** Broytt grein 11 í fastlønarsáttmálanum – nýggj orðing:

§ 11. Uppsøgn, sjúkraløn og eftirsituløn

Stk. 1. Uppsøgn, sjúkraløn og eftirsituløn verður samb. galdandi løgtingslóg um starvsmenn, tó soleiðis, at eftirsituløn verður goldin í mun til uppsagnartíðina hjá viðkomandi handverkara, t.e. minst 3 mánaðir og í mesta lagi 6 mánaðir.
Stk. 2. Handverkari kann fáa frí við løn, tá ið barn hansara er sjúkt, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hevur handverkari meira enn 2 børn undir 10 ár, kann hann fáa frí í upp til 20 dagar.

**3.** Sáttmálin og lønartalvan verða dagførd samsvarandi omanfyristandandi.

**4.** **Gildi sáttmálans**:

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober 2010, og kann sigast upp av pørtunum sambært ásetingunum í einstøku sáttmálunum, at fara úr gildi fyrstu ferð 1. oktober 2011.

*Tórshavn tann 2. februar í 2011*

**Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**